## Kvaldist í egnari spýggju

Sangarin í kenda bólkinum, Boyzone, Stephen Gately, doyði um vikuskiftið á Mallorca, 33 ára gamal. Tað er nú komið fram, at deyðsorsøkin var kvaling í egnari spýggju. Líksýn verður ikki hildið fyrr enn í morgin, men óalment verður sagt, at hetta var deyðsorsøkin. Tað var partnarin, Andy Cowles, sum kom fram á Gately, sum lá á knæ við høvdinum í einari pútu. Mest sannlíkt er, at hann hevur fingið ov nógv at drekka, hevur spý í svøvni og er síðani kvaldur í egnari spýggju, skrivar The Sun.



## Kursurin í topp

Neyðstaddi Amagerbankin hevur fingið vindin í ryggin, og kursurin á partabrøvunum í bankanum eru í morgn hækkað heili 40%. Harvið er fallið fríggjadagin upp á 30% næstan uppvigað. Hósdagin fall kursurin 31% og endaði á 36,80 og við fallinum fríggjadagin kom hann niður á 26,10. Nú er kursurin so komin upp aftur á 35. Fríggjadagin tók forstjórin, Jørgen Brændstrup, endiliga blaðið frá munninum og segði á TV2 News, at bankin fór at ríða stormin av. Tað hevur eftir øllum at døma fingið íleggjarar at trúgva upp á partabrøvini, skrivar boersen.dk.

# Svimjisambandið styrkir lívbjargni

**Farna vikuskifti hevur Svimjisamband Føroya í samstarvi við Dansk Svømmeunion hildið lívbjargingar-dómaraskeið í ÍSF-húsinum**



*Tey, ið hava tikið skeiðið hetta vikuskifti eru: Jákup Jacobsen, Torkil Mørkøre, Sigurd L. Lamhauge, Sigrun Davidsen, Doru T. á Torvlaðnum, Hákun Steingrímsson, Sørin S. Djurhuus, Reidar Simonsen, Pálin Olsen, Runi Gaardbo, Jórun Eið Johannesen, Jon Hestoy og Evald Rasmussen.*

Endamálsorðingin hjá Svimjisambandinum sigur at: Svimjisambandið skal menna og skapa áhuga fyri svimjing og at betra um heilsustøðuna og møguleikanum fyri lívbjargni. Ásannandi at lívbjargingarparturin ikki hevur fingið nóg stóra orku, hevur Svimjisambandið hetta vikuskifti havt trettan fólk á skeiði sum lívbjargingardómarar. Hesi trettan eru úr øllum økjum í landinum og farið verður nú miðvíst eftir at útbúgva so nógvir føroyingar sum gjørligt sum lívbjargarar.

Skeiðið er býtt í ein ástøðiligan part og ein part í svimjihylinum. Morten Hinnerup frá Dansk Svømmeunionen er skeiðsleiðari. Hesi trettan nýggju lívbjargingardómararnir hava møguleika at geva tvey lívbjargingarprógv: "Lívbjargingarroyndina" og "Lítla lívbjargingarroyndina" munurin á hesum báðum royndum er at fyri at fáa Lívjargingarroyndina skal ein verða fyltur 17 ár, henda royndin gevur samstundis rætt at arbeiða sum lívbjargari.

Yvirlit yvir lívbjargingardómararnir verður at finna í komandi viku á heimasíðuni hjá Svimjisambandinum, www.ssf.fo

## Fasti Gerðarrætturin gjørt úrskurð

**Fasti Gerðarrættur hevur sagt ávegis úrskurð í máli, har Fíggjarmálaráðið hevði kært Akademikarafelag Føroya. Úrskurðurin er at finna á www.fg.fg, og endaligi úrskurðurin verða lagdur út týsdagin**

TÍÐINDASKRIV

Akademikarafelag Føroya sendi tann 1. oktober út fráboðan viðvíkjandi Føroya Læraraskúla.

Fíggjarmálaráðið metti fráboðanina vera eitt óheimilað stríðsstig, og vendi sær beinanvegin til felagið.

Felagið metti ikki, at talan var um stríðsstig, og tí hevði Fíggjarmálaráðið ikki annað val enn at leggja málið fyri Fasta Gerðarrætt.

Fasti Gerðarrættur hevur givið Fíggjarmálaráðnum fult viðhald, t.e. fráboðanin er eitt óheimilað stríðsstig, og soleiðis er brot á friðarskyldina.

Fráboðanin hevur longu havt ta sera óhepnu ávirkan, at lærarar, sum høvdu lovað at koma at undirvísa á læraraskúlanum, hava ringt og boðað frá, at teir koma ikki kortini, vísandi til fráboðanina hjá felagnum.

Nú væntar Fíggjarmálaráðið, at lærararnir fara at undirvísa sum avtalað.

Fíggjarmálaráðið væntar, at Akademikarafelag Føroya fer at gera sítt til, at bøtt verður um skaðan, sum fráboðanin hevur gjørt. Somuleiðis roknar Fíggjarmálaráðið við, at Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara og Lærarafelag Handilsskúlans, sum tóku undir við fráboðanini, eisini fara at gera sítt til, at friður aftur skal valda á økinum.

*Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin tann 9. oktober í 2009*

# Oggi og Beinta í Søldarfirði

**Oggi Lamhauge og Beinta Hansen, sum bæði eru úr Søldarfirði, sýna fram í Grafiska Verkstaðnum í Søldarfirði í Mentanarvikuni í Runavík**

TÍÐINDASKRIV

Verkstaðurin heldur til í gamla handlinum hjá Lenu og Sámal Jákup Lamhauge og hevur verið karmur um virksemi hjá Oggi Lamhauge síðan 2006. Verkstaðurin, sum er góðar 60 fermetrar til støddar, er útgjørdur við steinprent og koparprent pressum. Eisini er eitt stórt alrúm, sum kann nýtast til framsýningar og undirvísingarhøli v.m.

Eisini hevur verkstaðurin verið nýttur til onkra framsýning hjá listamanninum saman við øðrum.

### Beinta Hansen

Hesaferð verður tað Beinta Hansen gestur á verkstaðnum. Hon hevur verið virkin á listarliga økinum í nøkur ár. Hon er sjálvlærd, men hevur gingið til grafikk í Tórshavnar Listaskúla, sum er kvøldskúlin hjá Tórshavnar Kommunu. Hon er ikki heilt nýggj í framsýningar høpi og hevur áður sýnt fram á mentanarvikum. Annars er Beinta nýliga útbúgvin sum sjúkrarøktarfrøðingur. Beinta kemur vantandi at brúka verkstaðin nakað, komandi tíðina.

### Oggi Lamhauge

Oggi hevur verið virkin á listarliga økinum, her á landið og útlendis, síðan hann gjørdist liðugur við útbúgving sína sum listgrafikari við lærda háskúlan í Íslandi, árið 1997. Kendasta verk hansara er uttan iva altartalvan í Hattarvíkar kirkju, sum varð latin kirkjuni í 2001. Oggi hevur eisini gjørt hópin av serprentum fyri stovnar og virki og undirvíst bæði børnum, ungum, vaksnum og menningartarnað í tekning, máling og grafikki. Oggi fekk trý ára starvsløn frá Mentanargrunni Landsins, frá apríl mánað 2006. Oggi arbeiðir við samtíðar list við trúarligum symbolum.



Listaframsýningin er opin soleiðis: hósdag, fríggjadag, leygardag og sunnudag frá 18.00 til 20.00. Hóskvøldið verður fernisering, har tónleikur við Hans Jacob Kollslíð og Kára Sverrisyni verður at hoyra.